**HAVBÚNAÐARFELAGIÐ**

**Uttanríkis- og vinnumálaráðið**
**uvmr@uvmr.fo**

Tórshavn 19. apríl 2024

Okkara tilv./Our ref.
/Havbxn-HBF---Ummxli-av-uppskoti-u.docx
Tykkara tilv./Your ref.

## Ummæli av uppskoti til løgtingslóg um tøkugjald

Havbúnaðarfelagið takkar fyri møguleikan at viðmerkja uppskotið til løgtingslóg um tøkugjald. Vísandi til stuttu hoyringsfreistina, er møguligt at fleiri viðmerkingar koma eftirfylgjandi.

Í uppskotinum sum nú liggur fyri, er talan um tvíliðaða skatta- og tøkugjaldsskipan, har annar parturin er nýggj tøkugjaldsskipan, meðan hin parturin er ein nýggjur serskattur á alivinnuna. Uppskotið hevur stóra ávirkan á alivinnuna, og skal eftir ætlan vera galdandi í nógv ár framyvir.

Havbúnaðarfelagið undrast á, at vinnan als ikki hevur verið partur av viðgerðini, nú grundleggjandi broytingar skulu gerast, og metur ikki at hetta uppskotið millum samgonguflokkarnar og Sambandsflokkin er eitt stig rætta vegin. Komandi mánaðirnar eiga at verða brúktir til at finna eina breiða semju um røttu skipanina. Ein breið semja um eina vánaliga skipan kann í ringasta føri forkoma framgongdini í føroyskari alivinnu.

Havbúnaðarfelagið mælir tí enn einaferð til, at loyvisgjaldið hjá alivinnuni byggir á skattliga úrslitið hjá vinnuni. Hetta hevur verið boðskapurin hjá Havbúnaðarfelagnum í skjótt 10 ár. Spurningurin er ikki um alivinnan skal rinda, men hvussu hon skal rinda.

### *Tøkugjaldið eigur at verða grundað á skattliga úrslitið*

Sum Havbúnaðarfelagið fyrr hevur víst á, heldur felagið framvegis, at loyvisgjøldini eiga at taka støði í skattliga úrslitinum. Hetta tryggjar, at feløgini í vinnuni ikki skulu gjalda loyvisgjald um søluprísurin fellur niðurum framleiðslukostnaðin.

Størsti fyrimunurin við einari skattligari skipan er, at hon tekur hædd fyri, at ymiskir firðir og ymisk alitøkni hevur ymiskan framleiðslukostnað við sær. Við at taka støði í skattliga úrslitinum, verður skattaskipanin ikki forðandi fyri nýskapan, og harvið ikki til hindurs fyri at fremja tær íløgur sum skulu gerast, um føroyska alivinnan áhaldandi skal mennast og hava møguleikar fyri burðardyggari framleiðslu og vøkstri. Harumframt er ein neutral skattlig skipan *einasti* háttur sum ikki er atferðarstýrandi fyri vinnuna.

Íløgur sum loysa seg áðrenn skatt og avgjøld, eiga eisini loysa seg eftir skatt og avgjøld.

Harumframt heldur Havbúnaðarfelagið, at um framleiðslukostnaðurin er hægri enn altjóða marknaðarprísurin, og undirskot er av framleiðsluni (áðrenn skatt og tøkugjald) eigur einki gjald at vera.

**Gjalda mest, tá ið vinnan tjenar minst.**
Tá ið lógin varð broytt fyri knøppum ári síðani var endamálið, at alifyritøkurnar skuldu gjalda lutfalsliga meira, tá ið laksaprísurin var høgur. Nýggja uppskotið hækkar munandi um skattin um feløgini ikki fara at hava stóran vinning, men lækkar hinvegin skattin, um avlopini gerast stór. Hetta er í beinleiðis mótsøgn við tað, sum samgongan annars hevur sagt vera grundgeving fyri at broyta tøkugjaldið.




Sum grafurin omanfyri vísir, verður samlaða gjaldið(tøkugjald, serskattur og partafelagsskattur) ið verður lagt á alivinnuna munandi hækkað við nýggja uppkotinum. Serliga er tað tá altjóða marknaðarprísurin er lágur, og vinnan harvið tjenar minst, at lutfalsliga nógv meir verður tikið inn. Hetta kann veruliga hava stórar avleiðingar fyri vinnuna í framtíðini.

At sjálvt grundsjónarmiðið sum bleiv lagt fram fyri undir einum ári síðani, nevniliga at *"tá prísurin á alifiski er høgur, so eigur gjaldið at vera hægri"*, longu er broytt, og nú skal vinnan gjalda lutfalsliga mest inn tá vinningurin er lítil, er bæði undrunarsamt og á ongan hátt tryggir karmar fyri vinnuna.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Við uppskotinum sum nú fyriliggur er tað serliga skatturin av fyrst tjentu krónunum sum verður munandi hækkaður. Hetta bæði við at lækka um framleiðslukostnaðin við at sølu- og flutningskostnaðir sambært uppskotinum ikki verða tiknir við tá framleiðslukostnaðurin verður gjørdur upp, og hartil við serkattinum sum eisini verður tikin frá fyrst tjentu krónunum.

**Vinnan harðari skattað enn kappingarneytar**
Í semjuskjalinum til uppskotið stendur at "skipanin tryggjar altjóða kappingarføri hjá vinnuni". Nýggja semjan hevur tvørturímóti við sær, at alivinnan í Føroyum verður harðari skattað enn í bæði Noregi og Íslandi.

Eitt ov høgt og fløkjasligt tøkugjald afturat nýggja serskattinum fer at steðga íløgum og framgongdini í alivinnuni, sum er drivin av gransking, nýmenning, íløgum og vøkstri. Harvið er eisini vandi fyri, at samlaði skatturin sum tíðin gongur fer at minka, hóast parturin av yvirskotinum, sum verður rindaður til skatt, økist.

**Versnandi kappingarføri**
Við lógaruppskotinum økist enn einaferð samlaði kostprísurin at ala laks í Føroyum, við at minka um grundarlagið á framleiðslukostnaðinum og serskattinum á vinnuna.

Tað er tó týdningarmikið at vísa á, at tøkugjaldið eftir hesari skipanini eisini økist sum tíðin gongur, og harvið eisini minkar um kappingarføri hjá vinnuni í Føroyum sum árini ganga. Grundin til hetta er, at tá tøkugjaldið verður grundað á søluprís, fer gjaldið at hækka so hvørt sum inflatión og príshækkingar verða í samfelagnum uttan at marginan hjá alifeløgunum vaksur. Hetta vil við tíðini føra til, at føroyska alivinnan tapir í kappingini við útheimin.

**Óstøðugir karmar**
Skipanin við loyvisgjøldum er, síðani hon kom í gildi, broytt fleiri ferðir við stuttum skotbrái og við avmarkaðari viðgerð. Havbúnaðarfelagið hevur fyrr víst á, at tað ikki er í lagi at gera slíkar týðandi broytingar í kørmunum hjá alivinnuni í skundi. Enn einaferð sær út til at hetta uppskotið skal skundast ígjøgnum.

Havbúnaðarfelagið hevur í fleiri førum víst á týdningin, at vinnan fær tryggar og varandi karmar at virka undir. Havbúnaðarfelagið tekur tískil eisini undir við, at tað eigur at verða gjørd ein breið semja millum politisku flokkarnar um skatta- og avgjaldsskipanina fyri alivinnna, so man kennir fortreytirnar í eina rúma tíð framyvir.

Hetta setir tó enn størri krøv til skipanina og sjálvt innihaldið í semjuni. Tí skipanin skal virka rúma tíð – eisini um tað gongur ímóti í vinnuni. Karmarnir sum breiða semjan leggur upp til í hesum uppskotinum eru hvørki tryggir ella gagnligir.

At gera eina nýggja skatta- og tøkugjaldsskipan fyri alivinnuna, sum byggir á skiftandi søluprísir úti í heimi, og hartil framleiðslukostnað og fóðurprís sum fyritøkurnar ikki

sjálvar hava, er als ikki tryggir karmar hjá vinnuni og fara eisini at vera atferðarstýrandi fyri vinnuna. Hetta er tí ikki rætta leiðin at ganga.

**Ov høgt tøkugjald ávirkar møguleikarnar at gera íløgur**
Hartil er umráðandi aftur at vísa á, at vøksturin í alivinnuni seinastu árini fyrst og fremst stavar frá, at virksemið á landi er økt munandi við útbyggingum av smoltstøðum, størri smolti og harvið styttri tíð á sjónum. Hetta hevði ikki verið møguligt uttan ovurhonds stóru íløgurnar, sum alivinnan hevur gjørt seinastu árini, og sum eru neyðugar at halda á fram við, fyri at tryggja kappingarførið og grundarlagið undir føroyskari aling. Alivinnan er sera kapitaltung vinna, og tað eru júst íløgurnar seinastu árini, sum hava verið avgerandi fyri stóru framgongdina í føroyskari alivinnu.

Íløgurnar skulu ikki einans skapa møguleikar fyri vøkstri, men eisini tryggja grundarlagið undir framhaldandi aling í Føroyum, burðardyggari framleiðslu og minka um váðan fyri bakkøstum í vinnuni.

Nevndin í
Havbúnaðarfelagnum

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo